# Arvurin á Toftum er tungur at lyfta

**Svørtu hestarnir av Toftum tóku føroyska fótbóltsheimin á bóli í fjør sum avbjóðarar til FM-heitið, men við stórari frágongd eru útlitini verri á Toftum í ár. Formaðurin Niclas Davidsen heldur, at fremsta málið er at fáa nýggju manningina samanspælda**

**Heini í Skorini**
*heini@sosialurin.fo*

**TOFTA ÍTRÓTTAFELAG, B68**
FO-650 Toftir
Tlf. 448068 / Fax 449050
www.b68.fo

**STOVNAÐ:**
21.12 1962

**FORMAÐUR:**
Niclas Davidsen

**MEISTARAR (3):**
1984, 1985, 1992

**STEYPAVINNARAR:**
Ongantíð

**GREIPUVINNARAR:**
Ongantíð

**Í 1. DEILD (23 ÁR):**
1981-

**Í EUROPA:**
4 ferðir: Meistarakapping 93-94, Intertoto Cup 96-97, 2001-2002, 2002-2003



*Eftir frágongdina í vetur verður torført hjá B68 at endurtaka avrikið frá í fjør, tá toftamenn fingu bronsuna og leingi vóru kandidatar til FM heitið*

Mynd: Álvur Haraldsen

Fróði Benjaminsen, Hans Fróði Hansen, Jann Ingi Petersen, Arnbjørn Danielsen, John Heri Dam, Dánial Hansen, Jákup Eli Olsen… Listin er langur við leikarum og profilum, sum eftir eitt væleydnað kappingarár á Toftum í fjør hava valt aðrar leiðir innanfyri og uttanfyri landoddarnar, og hóast toftamenn gaman í hava tryggjað sær nýggjar leikarar á Svangaskarði í ár, verður torført hjá B68 at liva upp til bronsuheiðursmerkini í fjør, sum kundu verðið skift út við gullkrónurnar, um B68 hevði vunnið toppdystin í Gundadali á HB…

## Politistarnir skulu lyfta arvin

Eftir missin frá í fjør hevur B68 fingið hendur á tveimum fyrrverandi B36´arum, sum seinastu árini hava nomið sær løgreglu útbúgving í Danmark. Fyrrverandi HB og B36 leikarin Mikkjal Thomassen skal saman við Herbert í Lon Jacobsen, sum er uppvaksin í B36, lyfta tunga arvin eftir frálíku avrikini í fjør. Herbert skal eftir øllum at døma avloysa Hans Fróða í verjupartinum, meðan Mikkjal helst skal vera primus motor saman við Øssuri Hansen á eini miðju uttan Fróða Benjaminsen og Jann Inga Petersen.

## Lovandi ungt ættarlið

Við frágongdini av áðurnevndu landsliðsleikarum verður størri ábyrgd og møguleikar hjá ungu leikarunum á Toftum, og júst á hesum øki hava toftamenn tilfeingi, sum spennandi verður at fylgja í ár. Í fjør hómaðust glottar frá serliga Jóan Peturi Poulsen og Kristian Anton Andreasen. Eru teir báðir nóg búnir til uppgávuna, er tað eitt stórt og møguliga eisini avgerandi pluss fyri eitt skert B68 lið. Ein annar lovandi leikari er álopsmaðurin Óli Olsen, sum møguliga kann vera ískoyti til eitt heldur tunt álop. Sambært leiðsluni í felagnum verður í løtuni bíðað eftir John Hera Dam, sum væntandi verður tøkur í mai mánaði, men enn er einki greitt viðvíkjandi honum. Formaðurin í B68, Niclas Davidsen, ásannar, at talan verður um eitt torførari kappingarár uttan landsliðsleikararnar frá í fjør, og má útgangsstøði felagsins vera við støði í frágongdini.

– Fremsta uppgávan er, at nýggja liðið stabiliserar seg og verður samanspælt, og um nýggju og yngri leikararnir megna uppgávuna, kann liðið standa seg ímóti teimum stóru, sigur Niclas Davidsen. Samanumtikið skal eitt nýtt B68 lið lyfta ein tungan arv frá í fjør, tá liðið av álvara kundi farið avstað við FM-heitinum, sum tó gjørdist til eitt triðja pláss.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar:** | | | |
| Albert Svævarsson | 18/-15 (0-0) | | Grindavík |
| Jacek Prcybilski | | | GÍ |
| **Verja** | | | |
| Herbert í Lon Jacobsen | | | B36, ÍF Føroyar |
| Ove Magnussen | | | |
| Mannbjørn Nesá | 6/0 (2-0) | | |
| Oleif Joensen | 1/0 (0-0) | | |
| Tomasz Przybilski | | | LÍF |
| Bogi Petersen | 18/0 (1-0) | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Øssur Hansen | 16/2 (0-0) | 51/2 | B36, GÍ |
| Kristian Poulsen | 2/0 (0-0) | | NSÍ |
| Jóhan Dávur Højgaard | 2/0 (0-0) | | |
| Alex Troels | | | |
| Mikkjal Thomassen | | | HB, B36, ÍF Føroyar |
| Øssur Jacobsen | 15/1 (3-0) | | B36 |
| Jóhan Petur Poulsen | 17/1 (3-1) | | |
| Eyðstein Skipanes | 6/1 (1-0) | | NSÍ |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Súni Fríði Johannesen | 16/5 (3-0) | 2/0 | GÍ, NSÍ, HB |
| Kristian Anton Andreasen | 11/0 (0-0) | | |
| Mortan Hansen | | | NSÍ |
| Óli Olsen | | | |
| **Tilgongd** | | | |
| Herbert í Lon Jacobsen | | | ÍF Føroyar |
| Mikkjal Thomassen | | | ÍF Føroyar |
| Jacek Przybilski | 14/-22 (0-0) | | GÍ |
| Tomasz Przybilski | | | LÍF |
| **Frágongd** | | | |
| John Heri Dam | 17/4 (1-0) | | Fremad Amager |
| Fróði Benjaminsen | 16/3 (5-0) | | Fram |
| Jann Ingi Petersen | 17/3 (2-0) | | Fremad Amager |
| Hans Fróði Hansen | 17/1 (2-1) | | Fram |
| Arnbjørn Danielsen | 17/0 (2-0) | | B36 |
| Dánial Hansen | 18/1 (1-0) | | NSÍ |
| Jákup Eli Olsen | 12/0 (1-0) | | Givin |
| Jákup Djurhuus | 1-0 (0-0) | | Givin |



# – Eg angri einki

**– Hóast eg møguliga hevði raðfest øðrvísi, skuldi eg gjørt alt umaftur, angri eg einki og havi havt mangar góðar løtur í fótbóltsheiminum, sigur 33 ára gamli Øssur Hansen av Toftum, sum seinastu tíggju árini hevur verið millum fremstu og drúgvastu leikarum her á landi. Hóast fótbóltstilvera hansara nú nærkast endanum, hevur Øssur Hansen ikki ætlanir um at gevast enn. Í ár skal hann vísa vegin á einum nýggjum og skerdum B68 liði**

**Heini í Skorini**
*heini@sosialurin.fo*



*– Tá eg vaks upp, spældu vit bara á grúsvallum, og tað var ein grundleggjandi broyting í føroyskum fótbólti, tá graslíkisvallir vunnu frama seinast í 80´unum, minnist Øssur Hansen. Í ár skal handverkarin vísa vegin á einum nýggjum og skerdum B68 liði*

Mynd: Maria Olsen

– Vit hava mist sjey leikarar frá í fjør, sum allir vóru fastir í byrjunaruppstillingini, og við hesum í huga stila vit ikki eins høgt í ár og í fjør, eru fyrstu orðini hjá 33 ára gamla Øssi Hansen av Toftum, tá vit spyrja hann um vónirnar til kappingarárið 2004.

Eftir at flestu berandi kreftirnar frá í fjør eru farnar til onnur feløg í Íslandi, Danmark og Føroyum, stendur fyrrverandi landsliðsleikarin í B68 at kalla einsamallur eftir við einum nýggjum B68 liði, sum hevur nógv at liva upp til eftir triðja plássið hjá toftamonnum í fjør. Øssur ásannar, at hetta avrikið neyvan verður endurtikið.

– Tað kann koppa báðar vegir fyri okkum, men eg skjóti uppá, at B68 í ár verður at síggja onkustaðni mitt í á stigatalvuni. Um nýggju leikararnir megna at lyfta tunga arvin frá í fjør, kunnu vit tó møguliga gera okkurt óvæntað, heldur Øssur Hansen. Heilt sambært bókini tekur royndi toftamaðurin sostatt nakað av trýstinum av nýggju B68-manningini undan kappingarársbyrjan.

## Einki comeback á landsliðið

Spurdur, hvussu leingi vit skulu vænta at síggja Øssur Hansen á hægsta stigi í føroyskum fótbólti, tekur hann eitt ár í senn.

– Nú havi eg sagt seinastu trý árini, at tíðin er búgvin at gevast, men so leingi sum lív og heilsa loyva mær, samstundis sum hugurin er til staðar, fari eg at spæla fótbólt, sigur Øssur Hansen. Miðvallarin av Toftum segði seg ikki vera tøkan til landsliðsfótbólt, tá Henrik Larsen tók við sum landsliðsvenjari, men eftir sera góð avrik í 1. deild varð hann yvirtalaður at luttaka í útidystunum móti Litava og Týsklandi. Sambært honum eru hesir dystirnir hansara seinastu í landsliðshøpi.

– Líkamikið hvussu tað fer at ganga persónliga í ár, er landsliðið eitt farið tíð. Eftir 51 landsdystir er hugurin ikki tann sami, so talan verður ikki um enn eitt comeback, staðfestir Øssur Hansen. Avboðið til landsliðið á sinni var óheppið, tí liðið stóð uttan nakran náttúrligan avloysara á vinstra miðvøllinum, sum Øssur seinastu mongu árini hevur havt einkarætt á undir Allani Simonsen. Útskiftingin á plássinum hevur verið stór, síðani Øssur gavst, har Heðin á Lakjuni, Hjalgrím Elttør, Rógvi Jacobsen og seinast Julian Johnsson hava roynt seg (Julian tó í øðrvísi spælskipan). Enn hevur eingin tó vist seg at vera upplagdi avloysarin í vinstra borði hjá legenduni av Toftum.

### Metingin

Toftamenn kunnu ikki roknast millum feløgini, sum fara at kappast í oddastríðnum í ár. Orsøkin er einfalt, at frágongdin hevur í vetrarsteðginum verið ov stór, og uttan fleiri av berandi kreftunum seinnu árini er talan um eitt viknað B68 lið. At tryggja sær Europa Cup luttøku tykist vera mest realistiska málið hjá B68 í kappingarárinum 2004.

## Frísparkið og FM-heitið

Afturlitandi á eina hendingarríka fótbóltskarrieru við 51 landsdystum og 1. deildarfótbólti í 16 ár minnist Øssur Hansen serliga tvey hæddarpunkt.

– FM-heitið í 1992 hjá B68 er millum størstu hendingarnar, og so verði eg eisini noyddur at nevna handan bóltin, sum í seinastu sekundunum fór inn móti Slovenia, har vit fingu javnleik, sigur Øssur Hansen. Her sipar Øssur til frálíka frísparkið, sum hann sjálvur setti í nærmasta málhorn í vyrtíðini móti Slovenia ein sólskinsdag í september í 2000 á Svangaskarði og javnaði til 2-2, eftir at Uni Arge hevði minkað um munin fáar minuttir áðrenn. Samstundis var minningarríki javnleikurin einastu ferð í føroysku fótbóltssøguni, at Føroyar hava fingið stig móti eini tjóð, sum í sama bólkaspæli hevur leikt seg í endaspælið. So uttan at vita tað skrivaði Øssur Hansen søgu við frálíka frísparkinum. Umframt hesar ítøkiligu hendingar nevnir Øssur eisini fleiri minningarrík tíðarskeið.

– Talan var eisini um eina sera spennandi og ikki minst mennandi tíð, tá eg spakuliga kom inn í landsliðshitan undir Allani Simonsen, minnist Øssur Hansen aftur.

## Graslíkið setti ferð á

Spurdur, hvør munur er á føroyskum fótbólti í dag samanborið við, tá hann sum 17 ára gamal á fyrsta sinni kom í 1. deildarhópin á Toftum, varpar hann fyrst og fremst ljós á umstøðurnar.

– Tá eg vaks upp, spældu vit bara á grúsvøllum, og tað var ein grundleggjandi broyting í føroyskum fótbólti, tá graslíkisvallir vunnu frama seinast í 80´unum, minnist Øssur Hansen á. Hann heldur, at yvirgongdin frá grúsi til graslíki var ein grundleggjandi fortreyt fyri menning, og í hesum tíðarskeiði vórðu stór framstig tikin í føroyskum fótbólti.

– Samanbera vit við hetta tíðarskeiðið eru umstøðurnar grundleggjandi øðrvísi fyri ungu leikararnar í dag við bæði graslíki og grasi, og sleppa teir enn tá at royndarvenja uttanlanda, um teir eru nóg góðir, sigur Øssur Hansen, sum fegnast um tað menning, føroyski fótbólturin hevur verið fyri.

## Fótbólturin kostar

Øssur Hansen ásannar eftir drúgvu og hendingarríku fótbóltsleiðina, at tíðarkrevjandi fótbólturin hevur kostað.

– Tað er ein sannroynd, at fótbólturin er farin við eini øgiligari tíð, og hevði eg gjørt alt umaftur, hevði eg møguliga raðfest øðrvísi, men tó angri eg so einki í dag og havi havt mangar góðar og minningarríkar løtur í fótbóltsheiminum, sigur ein afturlitandi Øssur Hansen.

Eftir at flestu stóru nøvnini nú eru farin av Toftum, stendur Øssur Hansen at kalla einsamallur eftir sum profilur og skal leiða eitt nýtt B68 lið í gjøgnum eitt kappingarár við einum tungum arvi at lyfta frá í fjør. Avbjóðingarnar eru stórar bæði í Føroyum og í stóra Europa.